Tvøroyri, tann 21.08.2026

# ÚTBOÐSTILFAR

## Ferðslustýring á Krambatanga og á Eystaru bryggju í Tórshavn, leið 7

1. Innleiðing
2. Lýsing av uppgávu
3. Vavið
4. Skipan av vaktum
5. Mannagongd fyri akfør við og uttan bílegging
6. Upplæring
7. Avtalutíðarskeið og treytir
8. Útgreining av tilboði
9. Fyrivarni um tillagingar
10. Avrokning
11. Viðgerð av tilboðum og freistir
12. Gildiskoma og sáttmálatíðarskeið
13. Spurningar ella meira kunning

### 1. Inngangur

Ferðslustýringin á Krambatanga í Trongisvági og á Eystaru Bryggju í Tórshavn verður boðið út sum alment útboð sambært rundskrivi frá fíggjarmálaráðnum, te. rundskriv nr. 9003 frá 1. juli 2019 um keyp av vørum og tænastum.

Henda útgreining av tilboðsfyrispurningi verður einans nýtt í sambandi við at ferðslustýringin verður bjóðað út, tilboð verða latin og í sambandi við undirskriving av avtalu um ferðslustýring.

Viðlagda avtala um ferðslustýring ásetir krøv fyri ferðslustýringina og skipar annars viðurskiftini millum partarnar. Ferðslustýringin verður skipað við grundarlag í avtaluni. Fyrivarni um avtaluna verða ikki góðtikin. Tilboð við fyrivarni um avtaluna verða vrakað.

### 2. Lýsing av uppgávu

Í sambandi við plássbílegging umborð á Smyrli, er tørvur á vaktum við bilrøðirnar á Krambatanga, Suðuroy og á Eystaru bryggju í Tórshavn.

Uppgávan hjá vakti/um er eitt nú at:

1. lata økið upp til bilrøðirnar, so at akfør hjá ferðandi kunnu stilla seg í bilrøðirnar,
2. skanna nummarplátur á akførum inn á skipanina við hondtelefonum ella aðrari útgerð,
3. vegleiða bilførarum í, millum annað, at stilla seg í røttu bilrøðina og onnur viðkomandi viðurskifti.

Arbeiðið verður leypandi samskipað saman við manningini umborð og/ella við farmastøðina á staðnum umvegis sendarar. Vaktin við bilrøðirnar kunnar viðkomandi partar um, hvussu bilrøðirnar vera skipaðar á hvørjum túri og manningin, og/ella starvsfólk á farmastøðunum boða vaktunum frá ymiskum viðurskiftum, ið kunnu stinga seg upp.

SSL arbeiðir við at automatisera hesar uppgávur og skulu vaktir uttan eykakostnað luttaka í royndarverkætlanum, herundir við at royna automatiseringar og -royndir, innan fyri ta arbeiðstíð, tá vaktir eru á staðnum á Krambatanga í Suðuroy og á Eystaru bryggju í Tórshavn.

### 3. Vavið

Til flestu fráferðirnar skal vaktin/ir vera klár at røkja sínar uppgávur 1 tíma fyri fráferð. Undantikið er tó á túrum, har roknast kann við nógvum ferðafólki og akførum, ella har SSL og veitarin avtala, at akfør kunnu sleppa fyrr inn á økið, til dømis til fráferð fríggjadag kl. 13:00 (Tórshavn) og sunnudag kl. 17:30 (Krambatangi)

Fráferðirnar á leið 7 eru hesar:

| 7 TVØROYRI - TÓRSHAVN | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Av/úr** | **MÁN** | **TÝS** | **MIK** | **HÓS** | **FRÍ** | **LEY** | **SUN** |
| | **Fráferð** | **Fráferð** | **Fráferð** | **Fráferð** | **Fráferð** | **Fráferð** | **Fráferð** |
| Tvøroyri | 06:00 | 07:00 | 06:00 | 06.00 | 07:00 | | 08:30 |
| Tórshavn | 08:45 | 13:00 | 08:45 | 08:45 | 13:00 | 07:00 | 11:00 |
| Tvøroyri | 11:30 | 16:00 | 11:30 | 11:30 | 16:00 | 09:30 | 17:30 |
| Tórshavn | 16:00 | 19:00 | 16:00 | 14:15 | 18:30 | 16:00 | 20:00 |
| Tvøroyri | 18:45 | | 18:45 | 17:30 | 21:00 | 18:30 | |
| Tórshavn | 21:15 | | 21:15 | 21:15 | | 21:15 | |

Talan er um 36 fráferðir pr. viku.

Tó eru undantøk í galdandi ferðaætlan, ið leypandi vera lýst á 7 Suðuroy - Tórshavn- Strandferðslan, ella kunnað á annan hátt.
Veitarin skal tillaga sína tænastu eftir hesum undantøkum og túrum av fráferðum, ið eru galdandi á teimum døgum, har siglt verður við øðrum fráferðum enn í galdandi ferðaætlan.

### 4. Skipan av vaktum

Sum útgangsstøði er í dag brúk fyri einum til tveimum vaktarstarvsfólkum pr. fráferð á flestu fráferðum. Hetta fyri at tryggja smidliga avgreiðslu av akførum og ferðafólki til eina og hvørja tíð. Arbeiðstíðin er 1 tíma undan fráferð og til skipið hevur loyst frá bryggju.

Veitarin hevur atgongd til plássbíleggingarskipanina, og skal leypandi meta um tørvin á vaktum pr. fráferð, tó altíð í samráð við Strandferðsluna. Á ávísum túrum kann talið á akførum vera so mikið lítið, t.e. minni enn 30 akfør, at veitarin kann lækka talið á vaktarstarvsfólkum.

Á túrum við nógvum akførum og ferðafólki, kann veitarin í samráð við Strandferðsluna taka avgerð um, at seta fleiri vaktir enn 2 til ávísar fráferðir.

Undirpunkt 8: ***"Útgreining av tilboði"*** sæst **vegleiðandi** útgreining av tørvi á vaktum pr. fráferð. Hesin kann broyast alt eftir árstíðini og aktuella eftirspurninginum á einstaska túrinum. Tað er ábyrgdin hjá veitaranum at tryggja, at talið av vaktum stendur mát við tørvin, tó at talið av vaktum ikki skal vera størri enn neyðugt.

Um seinkingar eru á leiðini, skal arbeiðið tó byrja sambært uppruna fráfaringartíðini uttan so, at annað er lýst ella avtalað.

Veitarin fær neyðuga samskiftisútgerð og útgerð til skanning, skráseting og inngjalding frá Strandferðsluni. Eisini kann veitarin nýta tey høli, ið Strandferðslan hevur tøk á viðkomandi plássi.

Veitarin hevur fulla ábygd av egnu starvsfólkaviðurskiftum, herundir at viðkomandi er skikkaður til uppgávuna og hevur barnaváttan. Strandferðslan kann krevja at veitarin ikki nýtir starvsfólk, um so er, at viðkomandi hevur verið orsøk til grundaðar klagur ella at Strandferðslan metir, at viðkomandi ikki er egnaður til at røkja starvið av grundaðum orsøkum.

Veitarin hevur ábyrgd av at starvfólk eru ílatin og útgjørd soleiðis, at til ber at røkja uppgávuna fyri Strandferðsluna. Tó kann avtala gerast um, at starvsfólk hjá veitaranum fáa klæðir ella aðra ámerking, ið greitt tilskilar, at viðkomandi starvsfólk veitir eina tænastu vegna Strandferðsluna.

## 5. Mannagongd fyri akfør við og uttan bílegging

Vegleiðandi mannagongd fyri akfør við og uttan bílegging er hendan:

- **Akfør, ið hava bílagt og eru á økinum áðrenn evstamark:**

  Skulu beinast í røðina við bilum, ið hava bílagt og eru møttir til tíðina. Hesir bilar eiga altíð at sleppa umborð til túrin, tey hava bílagt.

- **Akfør, ið hava bílagt og eru á økinum eftir evstamark:**

  Skulu beinast í røðina við bilum, ið antin hava ferðaseðil í bíðistøðu, ella hava bílagt og eru møttir ov seint. Hesir bilar sleppa við, um tað er pláss tøkt umborð, eftir at farmur er koyrdur umborð. Tað er 1. stýrimaður, ið tekur avgerð um, hvør sleppur umborð.

- **Akfør, ið ikki hava bílagt frammanundan:**

  Førarir við akførum, ið ikki hava bílagt frammanundan, skulu keypa ferðaseðil frá vaktunum á staðnum, og vísast til bilrøðina fyri akfør, ið ikki hava bílagt og ikki eru møtt til tíðina.

- **Um kundi hevur bílagt skeivan ferðaseðil, ella á annan hátt ynskir ferðaseðil endurgoldnan ella vísir ónøgdsemi:**

  Vaktir skulu altíð vísa kundum til kundatænastuna hjá Strandferðsluni, og biða tey seta seg í samband við Strandferðsluna. Tað er sera umráðandi, at vaktir ikki lova endurgjald fyri nakað. Hetta er ein avgerð, ið kundatænastan hjá Strandferðsluni tekur.

Gevið gætur, at mannagongdirnar kunnu verða dagførdar leypandi.

### 6. Upplæring

Tey, ið fáa uppgávuna at røkja hetta starv, fáa upplæring frá einum royndum persóni á farstøðini í Tórshavn og á Krambatanga. Tað eru settir 4 tímar av til upplæring tilsamans.

Eru tað enn ivamál og spurningar, ið uppstanda, ber til at ringja til ein kontaktpersón ta fyrstu vikuna. Eftir hetta væntar Strandferðslan, at vaktin dugur sítt arbeiði til lítar, og er eitthvørt at spyrja um, er møguligt at senda teldupost ella tosa við kontaktpersónin hjá Strandfaraskipum Landsins í vanligari arbeiðstíð, tá ið viðkomandi er tøkur.

### 7. Avtalutíðarskeið og treytir

Avtalutíðarskeiðið er galdandi frá 1. november 2026 til og við tann 31. oktober 2027.

Strandferðslan kann eftirfylgjandi av sínum eintingum leingja avtalutíðarskeiðið við 3 mánaðum í senn, treytað av, at Strandferðslan hevur boðað veitaranum frá í seinasta lagi 1 mánaða áðrenn avtalutíðarskeiðið rennur út.

Strandferðslan og veitarin kunnnu strika avtaluna í avtalutíðarskeiðinum, um hin parturin ger seg skyldugan í einum grovum brotið av avtaluni og/ella ferð eftir ferð brýtur avtaluna.

Báðir partar kunnu uppsiga avtaluna við 4 vikurs freist at fara úr gildi seinasta dag í einum mánaði.

Um veitarin ger seg skyldugan í viðurskiftum, sum gevur Strandferðsluni grundarlag fyri at meta, at veitarin ikki framyvir fer at røkja ferðslustýringina nøktandi, kann Strandferðslan uppsiga avtaluna við 3 vikurs freist.

Sí eisini punkt 9 viðvíkjandi møguligum tillagingum av vaktartímum.

### 8. Útgreining av tilboði

Veitarin verður biðin um:

1. at geva tilboð uppá **<u>fastprís pr. vaktartíma</u>**.
2. at greina í stuttum, **<u>hvørjar førleikar og viðkomandi royndir</u>** veitarin og tess starvsfólk hava fyri at kunna loysa lýstu uppgávu fyri Strandferðsluna.
3. Lata inn ársrokniskap fyri seinast góðkenda roknskaparár.
4. Tilboðgevarar skulu undirskriva viðløgdu <u>trú og heiður váttan</u> um falna skuld til tað almenna. Váttanin skal viðleggjast boðnum.

Í talvuni niðanfyri sæst, hvat metti tørvurin er pr. fráferð. Talvan er vegleiðandi og treytað av, at komu- og fráfarðingartíðir halda.

1 vakteind pr. túr merkir, at roknast skal við 1 vakt á 1 tíma fyri viðkomandi fráferð.
1,5 vakteind merkir, at roknast skal við 1 ella møguliga 2 vaktum á 1 tíma fyri viðkomandi fráferð
2,0 vakteind merkir, at roknast skal við 2 vaktum í ein tíma fyri viðkomandi fráferð.

**SUMMARTÍÐARSKEIÐ (1/5 - 15/9)**

7 TVØROYRI - TÓRSHAVN

| Av/úr | Mánadag | | Týsdag | | Mikudag | | Hósdag | | Fríggjadag | | Leygardag | | Sunnudag | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | kl. | Vakt | kl. | Vakt | kl. | Vakt | kl. | Vakt | kl. | Vakt | kl. | Vakt | kl. | Vakt | |
| Tvøroyri | 6:00 | 1.50 | 7:00 | 1.50 | 6:00 | 1.50 | 6:00 | 1.50 | 7:00 | 1.50 | | | 8:30 | 1.50 | |
| Tórshavn | 8:45 | 2.00 | 13:00 | 2.00 | 8:45 | 2.00 | 8:45 | 2.00 | 13:00 | 2.00 | 7:00 | 1.50 | 11:00 | 1.50 | |
| Tvøroyri | 11:30 | 1.00 | 16:00 | 1.50 | 11:30 | 1.50 | 11:30 | 1.50 | 16:00 | 2.00 | 9:30 | 2.00 | 17:30 | 2.00 | |
| Tórshavn | 16:00 | 2.00 | 19:00 | 1.50 | 16:00 | 2.00 | 14:15 | 2.00 | 18:30 | 2.00 | 16:00 | 1.50 | 20:00 | 2.00 | |
| Tvøroyri | 18:45 | 2.00 | | | 18:45 | 2.00 | 17:30 | 2.00 | 21:00 | 1.00 | 18:30 | 2.00 | | | |
| Tórshavn | 21:15 | 1.50 | | | 21:15 | 1.50 | 21:15 | 1.50 | | | 21:15 | 1.00 | | | **Íalt** |
| | | 10.00 | | 6.50 | | 10.50 | | 10.50 | | 8.50 | | 8.00 | | 7.00 | **61.0** |

**VETRARTÍÐARSKEIÐ (16/9 - 30/4)**

7 TVØROYRI - TÓRSHAVN

| Av/úr | Mánadag | | Týsdag | | Mikudag | | Hósdag | | Fríggjadag | | Leygardag | | Sunnudag | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | kl. | Vakt | kl. | Vakt | kl. | Vakt | kl. | Vakt | kl. | Vakt | kl. | Vakt | kl. | Vakt | |
| Tvøroyri | 6:00 | 1.50 | 7:00 | 1.50 | 6:00 | 1.50 | 6:00 | 1.50 | 7:00 | 1.50 | | | 8:30 | 1.50 | |
| Tórshavn | 8:45 | 1.50 | 13:00 | 2.00 | 8:45 | 1.50 | 8:45 | 1.50 | 13:00 | 2.00 | 7:00 | 1.50 | 11:00 | 1.50 | |
| Tvøroyri | 11:30 | 1.00 | 16:00 | 1.50 | 11:30 | 1.00 | 11:30 | 1.00 | 16:00 | 2.00 | 9:30 | 2.00 | 17:30 | 2.00 | |
| Tórshavn | 16:00 | 1.50 | 19:00 | 1.00 | 14:24 | 1.50 | 14:15 | 1.50 | 18:30 | 2.00 | 16:00 | 1.50 | 20:00 | 2.00 | |
| Tvøroyri | 18:45 | 2.00 | | | 18:45 | 2.00 | 17:30 | 1.50 | 21:00 | 1.00 | 18:30 | 2.00 | | | |
| Tórshavn | 21:15 | 1.50 | | | 21:15 | 1.50 | 21:15 | 1.50 | | | 21:15 | 1.00 | | | **Íalt** |
| | | 9.00 | | 6.00 | | 9.00 | | 8.50 | | 8.50 | | 8.00 | | 7.00 | **56.0** |

**Samlað:**
Út frá hesum er metta arbeiðstíðin í miðal 58,5 tímar pr. viku.

Eru seinkingar ella broytingar í ferðaætlanini ella er tørvur á meira enn ásetta vaktartali ella tíðarnýtslu pr. túr, skal veitarin avrokna tíðarnýtsluna pr. vakt pr. túr sum vera nýttir til at loysa uppgávuna.

Allir veittir vaktartímar skulu avroknast sambært fastprísinum uttan mun til, nær á degnum fráferðir eru, ella um ein ella fleiri vaktir hava loyst uppgávuna.

Byrjað arbeiði pr. túr skal avroknast pr. tíma, tó at eftirfylgjandi arbeiðstíð skal avroknast pr. ½ tíma, um arbeitt verður undir 30 min. á seinast byrjaða arbeiðstíma.

## 9. Fyrivarni um tillagingar

SSL hevur ætlnir um at gera ymiskar mannagondir sjálvvirknar í sambandi avgreiðsluni av akførum á Krambatanga og í Tórshavn. Veitarin skal tí rokna við, at tørvurin á vaktum fer at minka við tíðini. Veitarin fær boð um slíkar broytingar í seinasta lagið 3 vikur áðrenn hesar vera settar í gildi. SSL tekur sær eisini rætt til at tillaga tørvin á vaktum av øðrum orsøkum, við somu fráboðanarfreist sum nevnd omanfyri.

## 10. Avrokning

Veitarin skal avrokna arbeiðið við Strandferðsluna fyri 4 vikur í senn, tó útgreinað pr. viku seg. Veitarin fær útflýggjað avrokningarskal frá SSL, ið skal útfyllast sambært vegleiðingunum til skjalið. Avrokningin kann eisini avgreiðast talgilt eftir avtalu við SSL.

## 11. Viðgerð av tilboðum og freistir

Tilboðið skal verða Strandferðsluni í hendi í seinasta lagi **mánadagin 7. september 2026**.

Tilboð skulu sendast til fyrisiting@ssl.fo, við yvirskrift "Boð uppá ferðslustýring." Váttan um falna skuld til tað almenna skal verða viðheft, tá tilboðið verður sent inn.

Støðutakanin hjá Strandferðsluni til tilbðini verður almannakunngjørd í seinasta lagi **18. september 2026** á keypsportalinum og við fráboðan til tilboðsgevararnar.

Innkomin tilboð vera mett eftir hesum leisti:

1. Prísur, t.e. **fastprís pr. vaktartíma** vektar 60%
2. Førleikar og viðkomandi royndir vektar 40%, harav
    a. Yvirskipaðir førleikar til uppgávu vekta 20%
    b. Royndir hjá starvsfólki og upplæring vektar 15%
    c. Støðufesti av fyritøku vektar 5%

Strandferðslan tilskilar sær rættin til ikki at taka av tilboðnum, sum hevur besta prís, og treytar sær rættin til at strika útboðið.
Útreiðslur, sum tilboðsgevarar hava í samband við hetta útboð, eru óviðkomandi fyri Strandferðsluna. Hetta er eisini galdandi, um Strandferðslan verður noydd at strika útboðið.

## 12. Gildiskoma og sáttmálatíðarskeið

Nýggja sáttmálatíðarskeiðið tekur við 1. november 2026.

## 13. Spurningar ella meira kunning

Mánadagin 31. august millum kl. 09:00 og 13:00 er møguleiki hjá áhugaðum tilboðsgevum at umbiða ein fund á 30 minuttir við Strandferðsluna, har høvi er at seta viðkomandi spurningar til útboðið.

Spurningar til innihaldið í útbjóðingartilfarinum kunnu annars sendast til Sólfríð B. Hammerfoss, virkandi samferðsluleiðara, á sob@ssl.fo.

Spurningar frá og svar til veitarnar verða lýst á keypsportalinum sum partur av útboðstilfarinum.